# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



*10 august fekk Ísak hesa fittu didduna*

9. august fingu Anja Poulsen og Michael Wildenhoft Jakobsen, Aalborg, eina dóttir, hon vigaði 2485 og var 48 cm long

10. august fingu Jónbjørg Mortensen og Hans Olaf Hentze, Hvalba, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3150 gr.

12. august fingu Ruth og Andrew av Fløtum, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm og vigaði 3150 gr.

13. august fingu Jóhanna og Alberg Gaardlykke, Nes, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3650 gr.

14. august fingu Tove Eklers og Allan á Argjum, Argir, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3400 gr.

15. august fingu Jacobina Heðinsdóttur og Eli H. Andreasen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3310 gr.

15. august fingu Hjalma Nielsen og Hans Holm Joensen, Saltangará, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3260 gr.

15. august fingu Heidi M. í Hjøllum, Saltnes og Hans I. Hansen, Fuglafjørður, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3655 gr.

16. august fingu Betina Kristiansen og Tórður Símun Nielsen, Tvøroyri, ein son. Hann var 47 cm langur og vigaði 2490 gr.

17 august fingu Susana Temprana úr Veracruz, Mexico og Jón Durhuus úr Havn eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 3210 gr. og eitur Rósa Marita. Tey búgva í Veracruz

19. august fingu Jonna Jensia Anthoniussen og Kristian Thomsen, Húsavík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3600 gr.

20. august fingu Durita og Rúni Dahl, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3625 gr.

## Dagurin

21. august. Sálomon. Til minnis um hin vísa kongin Sálomon, sum sagt er frá í kapitlunum 1-11 í fyrru Kongabók í Gamla testamenti. Navnið merkir friður og vælferð.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

Sosialurin -har tað hendir

# Petur Paula Petersen til minnis

**f. 06. aug.1969 - d. 29. apríl 2009**



Mikudagurin 29. apríl situr fastur í huga mínum. Eg var farin til arbeiðis sum vanligt, umleið klokkan hálvgum tíggju ringir telefonin, og í hinum endanum hoyri eg røddina á vinmanninum Peturi - gott var lagið. Vit tosaðu um leyst og fast, sum vit so mangan gjørdu. Petur var raskur at ringja til mín, og til aðrar av vinmonnum sínum.

Sama dag klokkan hálvgum tvey koma tey sorgarboð, at Petur var deyður av einari arbeiðsvanlukku.

Eg má siga, at alt stegaði upp. Eg fór niður úr stiðjanum eg stóð í, og legði hamaran frá mær og settist í bøin. Hetta kann ikki bera til, nei, nei ikki Petur hjá Boga. Harra Guð, havi akkurát tosað við hann í telefon, og lagið var so gott. Hann var so glaður. Men hvat, deyðin spyr ikki eftir um vit eru glað, eiheldur hvar vit er stødd, tá hann vitjar.

Petur var mín fyrsti lærumeistari, tá vit sum smádreingir bygdu hyttu uppi í Nesagarðinum. Hann stóð á odda, tá vit bygdu kassabil og mangt annað. Petur var tvey ár eldri enn eg, men vit spældu nógv saman og vóru nærmastu grannar.

Tá vit blivu vaksnir, skaffaði Petur mær læripláss hjá Valbjørn Dalsgarð. Vit arbeiddu saman í nøkur ár, bæði í Føroyum og í Danmark.

Petur var sera trúfastur, og tú visti altíð, hvar tú hevði hann. Raskur og erligur í øllum hann fekst við.

Hesi seinastu árini hevur Petur búð og arbeitt í Danmark, men trúliga vitjaði hann heim aftur á klettarnar og hevði lítla sonin Boga við sær.

Petur var heilur í øllum. B71 hevði hansara stóra áhuga, og ringdi hann trúliga til pápa sín at frætta øll úrslit um fótbólt.

Seinasta túrin Petur var heima var á páskum til barnadópin hjá tvíburðunum hjá Arthur. Eingin visti av at Petur skuldi koma, soleiðis gleddi Petur familjuna hjá sær.

Petur gav sær altíð tíð at vitja vinir sínar, og soleiðis var eisini henda síðsta túrin. Vit høvdu eina deiliga hugnaløtu saman, og har blivu allir verðsins trupulleikar loystir, sum vit ofta gjørdu tá Petur vitjaði.

Petur er ikki millum okkum meir, og sum prestur segði í kirkjuni til jarðarferðina, „einki verður tað sama aftur" og „sorg er heimleysur kærleiki". Hetta er so satt sum tað er sagt. Á gravarbakkanum fór at regna, tað var sum himmalin græt við okkum øllum.

Góða Henrietta, Bogi, systkini og lítli Bogi. Harrin sum øllum valdar styrkir tykkum í sorgini og sakninum. Petur verður ongantíð gloymdur. Minnini eiga vit nógv og rík, og tey goyma vit væl.

Hvíl í friði góði vinmaðurin Petur, vit møtast aftur.

**Jógvan Krog Mortensen**

Fyri 30 árum síðan:

# Húsaflyting í 1979




*Her fara húsini fram við raðhúsunum í J. Patursonargøtu*

Í vikuni skrivaðu vit um eini hús í Klaksvík, sum vórðu flutt frá einari adressu til eina aðra.

Í Sosialinum 15. august 1979, eru myndir av einum eldri húsum í Havn, sum vórðu flutt av Dalavegnum og út í Hornabø.

Leygarkvøldið 11. august lyftu tveir kranar húsini upp á ein vogn, og kl. 3 um náttina byrjaði sjálv flytingin. Ein gravimaskina koyrdi fremst og annar av kranunum aftanfyri. Húsini, sum eru frá 1896, standa í dag á sama øki sum Hornahúsini í Hornabø.